

*Kappingin í trolbøting hevði stóran áhuga millum manna*

viðkomandi evni fyri sjómenn er við í skránni í ár. Í hesum sambandi varð nevniliga hildin ein fundur um eftirlønir í fiskivinnuni týskvøldið, og í gjárkvøldið var eitt tiltak við sjómanssøgum og sjómansvísum í Atlantis.

Annars verða flestu tiltøkini leygardagin. Tá verður byrjað kl. 9 og endað verður einaferð út á náttina.

## Stór mál

Fyrireikararnir av tiltakinum hava fingið sera góðan stuðul frá fólki og frá stuðlum.

Og teir síggja sjálvir sera stórt í tí, at til ber at hava ein slíkan dag í Klaksvík.

– Vit halda, at føroyingar í minsta lagi einaferð um árið eiga at seta okkara sjóvinnufólk, sjóvinnu og okkara størstu útflutningsvøru í hásætið. Tí eigur ein sjómannadagur sum hesin at seta sær stór mál.

– Føroyar eru eitt lítið land, ið liggur mitt úti í Norðuratlantshavinum. Júst eins og okkara grannatjóðir, so hava vit livað av tí sum havið hevur givið og hava vit altíð sett okkara álit á fiskivinnuna. Men skulu vit verða við í hesari kapping, so er umráðandi ikki at smæðast burtur á tí altjóða pallinum, men alla tíðina seta sær stór mál. Og hví skulu vit ikki tað?, siga fyrireikararnir í vælkomu síni til tiltakið.

## 6000 fólk

Samskipararnir av hesum megnar tiltaki duga ikki at siga, hvussu nógv fólk mundu vitja Sjómannadagin í fjør.

– Vit seldu jú ikki atgongumerki, men kortini meta vit at eini 3000 fólk úr øllum landinum vóru her fyri einum ári síðani.

– Við teirri fjølbroyttu skránni, sum vit hava í ár, er ikki óhugsandi at talið verður tvífaldað, sigur hann.

Veðurmaðurin, Petur Skeel Jacobsen boðar frá góðveðri um vikuskiftið, og tí kann væntast, at fólk kring alt landið fara til Klaksvíkar um vikuskiftið.

Hann sigur frá lítlum vindi, turrveðri og sólarglottum. Hitin verður millum 12 og 17 stig.

Einasti vansin í so máta er, um ikki tað verður ov lítil vindur til ætlaðu kapp-



*Ein gamal føroyskur bátur er ein natúrligur partur av einum føroyskum sjómannadegi*



*Tað ræður um at konsentrera seg, tá kappast skal um hvør er skjótasti trolbøtarin. Tann skjótasti bøtarin í fjør gjørdi hetta eftir 7 minuttum og 49 sekundum*